## Risalønir í Rosenborg

Norska stórfelagið, Rosenborg, skal í ár rinda spælarum og starvsfólkum yvir 90 milliónir krónur í lønum, og tað hevur fingið fyrrverandi leiðsluna í felagnum at tala at, tí stóri lønarvøksturin í felagnum ger, at Rosenborg eitt nú hevur tvær ferðir so stórar lønarútreiðslur sum tvey av hinum størru feløgunum, Vålerenga og Stabæk.



## FA kannar Gerrard

Liverpool-liðformaðurin, Steven Gerrard, verður nú kannaður av enska fótbóltssambandinum, FA, eftir at hann mánakvøldið vísti dómaranum í dystinum ímóti Wigan tveir fingrar, tá hann fekk eina ávaring. Sum um tað ikki var nóg ringt, at Liverpool tapti dystin, kann tað nú eisini enda við karantenu til Gerrard.



**Nicklas Bendtner skreiðar her bóltin í mál til 1-0, sum skuldi vísa seg at gerast bara tað fyrsta av trimum málum hjá honum – og tað fyrsta av fimm hjá Arsenal ímóti Porto í gjárkvøldið**
Mynd: Ian Kington/Polfoto

# Bendtner í røttum málrúsi

**Arsenal prógvaði í gjár, at liðið avgjørt skal takast í álvara í ár, samstundis sum Nicklas Bendtner svaraði atfinnarum sínum aftur við trimum málum, tá Arsenal við sannførandi 5-0 sigri á heimavølli móti Porto spældi seg í fjórðingsfinalurnar í Champions League**



Tróndur Arge

Tað gongur skjótt fyri seg í fótbólti. Leygardagin brendi danski framherjin, Nicklas Bendtner, fýra upplagdar møguleikar, tá Burnley var á vitjan. Fjølmiðlarnir vóru skjótir at seta spurnartekin við 22 ára gamla danan, men í gjár svaraði Bendtner so sjálvur aftur. Hann fekk tríggjar møguleikar og skoraði trý mál!

– Hatta var fantastiskt! Tað er langt síðani, at eg havi skorað hattrick. Eg hevði lagt dystin leygardagin aftur um meg, og hugsaði bara um dystin í dag. Sigurin gevur okkum nógv sjálvsálit. Vit vilja vinna Champions League, tí tað hevur felagið ongantíð megnað, segði Bendtner eftir dystin.

Tá tað undan dystinum gjørdist greitt, at liðskiparin og snúningsdepilin á Arsenal-liðnum, Cesc Fabregas, ikki fór at verða tøkur, kom spurningur: Klárar Arsenal seg uttan Fabregas? Liðið hevði jú tapt fyrra dystin 2-1, men venjarin, Arsene Wenger, segði undan dystinum, at tað var ongin umbering, at Fabregas var skaddur.

### Tvær málperlur

Arsenal prógvaði allan dystin ígjøgnum, at liðið eisini klárar seg uttan Fabregas. Maðurin, ið avloysti hann á miðjuni, var Samir Nasri. Umframt at spæla ein góðan dyst, so skoraði hann eisini eitt framúrskarandi mál til 3-0. Við einum einmansavriki dribblaði Nasri fram við helminginum av Porto-spælarunum, og endaði við at smekka bóltin á aftaru stongina og inn úr spískum.

Tríggjar minuttir seinni vísti Arsenal ein aðra síðu av vakra fótbóltsspælinum. Eftir eitt hornaspark til Porto, fór Arsenal í mótálop. Verjan hjá portugisunum kláraði slett ikki at fylgja Andrei Arshavin, ið legði bóltin fyri føturnar á Emmanuel Eboue, sum dró fram við málmanninum og skoraði. Tvey mál, ið vístu Arsenal, tá liðið er best.

Eftir dystin var venjarin hjá Arsenal, Arsene Wenger, væl nøgdur, men hann spardi tó eitt sindur upp á rósandi orðini til Nicklas Bendtner.

– Vónandi fær Bendtner ikki alt ov gott sjálvsálit av hesum, men tað er gott fyri hann. Eg eri glaður hansara vegna. Hetta vísur eisini, hvussu skjótt tað gongur í fótbólti. Vónandi gevur hetta honum hug at arbeiða harðari, segði Wenger við einum smíli, samstundis sum hann staðfesti, at hann ikki ræðist at møta einum enskum liði í fjórðingsfinaluni.

## Robben-perla bjargaði Bayern

**Tað sá leingi út til, at Fiorentina fór at koppa týska risanum úr Bayern München. Italska liðið var á odda bæði 2-0 og 3-1, men tá avtornaði, komu týskararnir víðari**

Fiorentina skuldi á heimavølli í Firenze venda einum 2-1 tapi móti Bayern München, fyri at koma víðari til fjórðingsfinalurnar í Champions League. Og tað sá eisini út til at ganga eftir ætlan, tá Juan Vargas legði Fiorentina á odda í fyrra hálvleiki. Í seinna hálvleiki økti Stevan Jovetic til 2-0, áðrenn Mark van Bommel minkaði um munin til 2-1.

Stevan Jovetic kom aftur á máltalvuna løtu seinni, tá hann gjørdi tað til 3-1, men minuttin seinni skoraði Arjen Robben eina perlu av einum máli. Hann dribblaði fram við fleiri Fiorentina-spælarum og smekkaði bóltin í handara mál horn.

Hetta málið sendi Bayern München í fjórðingsfinaluna. Samanlagt endaði tað 4-4, men týska liðið skoraði fleiri mál á útivølli og kemur sostatt víðari.

**tróndur**